# DEILDARLEIÐARI á Sýnsdeildini

Søkt verður eftir deildarleiðara til Sýnsdeildina á Bileftirlitinum til setan skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Deildarleiðarin hevur mótvegis stjóra stovnsins ábyrgd av Sýnsdeildini og er partur av leiðslubólkinum á stovninum. Deildarleiðarin skal mótvegis stovnsleiðsluni, trúfast og samvitskufult umboða áhugamál stovnsins.

**Deildin umfatar:**
- regluligt sýn og umsýn
- tekniskar kanningar og uppmátingar av akførum
- skrásetingarsýn av lastbilum og bussum
- dagføring av lógum, kunngerðum og reglugerðum á bil-tekniska økinum
- umsiting av floksgóðkenningum og meginfloksgóðkenningum
- tekniskar lýsingar og kravfestingar fyri akfør
- tekniskar kravfestingar fyri eftirlitsarbeiðið
- dygdartrygging av eftirlitsarbeiðinum
- útbúgving av starvsfólki í Sýnsdeildini
- umsjón og viðlíkahald av sýnshøllum og útbúnaði stovnsins
- viðlíkahald av tænastuakførum
- góðkenning og eftirlit við bilverkstøðum til umsýn
- samstarv við Bileftirlit í hinum norðanlondunum
- annað norðurlanda samstarv

Umframt deildarleiðaran, starvast í Sýnsdeildini í løtuni 4 sýnsmenn, sum vísa til deildarleiðaran.

**Førleikakrøv:**
Tann sum settur verður í starvið, skal ástøðiliga vera tekniskt væl fyri, so sum verkfrøðingur ella maskinmeistari, hava drúgvar royndir á biltekniska økinum, góð samstarvs- og leiðaraevni og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi fakfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen ella Hans J. Stenberg á tlf. 350 400. Umsóknir saman við prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. september 2000.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting. Stovnurin er skipaður í 3 deildir. Umframt høvuðssæti í Tórshavn, hevur stovnurin sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.*


# Lastbilførari

Søkt verður eftir royndum lastbilførara til fast arbeiði við transportkoyring. Tú skalt helst ikki vera undir 25 ár.

Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,

**Bill. mrk. 148**



www.wenzel.fo

Ford







# Ráðstevna 23. august í Norðurlandahúsinum

**Stýrisskipanarssambond í vesturheimi**

**- hugleiðingar um valmøguleikar millum loysing og samband**

**Consideration on Territorial Politics**
**- A Conference on Options**

Tað fara stórar broytingar fram í Føroyum og fyri framman stendur eitt val um, hvussu Føroyar skulu skipast í framtíðini; í ella uttanfyri ríkisfelagsskapin. Fyri at lýsa hesa støðu og fýra stýrisskipanarmøguleikar, hava vit fingið nakrar av heimsins leiðandi serfrøðingum at koma til Føroya at greiða frá líknandi støðum aðrastaðni í heiminum, og seta Føroyar inn í hesa mynd.

Ráðstevnuskrá

10.00: Setan v. Høgna Hoydal, varaløgmanni

10.15: Inngangur v. Jógvan Mørkøre, Fróðskaparsetur Føroya

10.45: Fyrilestur v. professor Brendan O' Leary, The London School of Economics: Territorial Politics.

11.30 Fyrilestur v. Dr. Mads Qvortrup, the University of Aarhus, Denmark: Confederalism.

12.15: Ábit

1.30: Fyrilestur v. Professor Nelson Polsby, University of California, Berkeley: Federalism - Lessons from America.

3.00: Fyrilestur v. Professor James Mitchell, Strathclyde University, Scotland: Independence.

4.00: Pallborðsorðaskifti.

Fyriskiparar

Søgu & Samfelagsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya

Mads Qvortrup & Bogi Eliasen
Stjórnmálafrøði, Århus Universitet

Ráðstevnumálið er enskt.

Kostnaður: 500 kr. og 200 kr fyri lesandi

Tilmelding innan 16/8 hjá

Samskipara: Bogi Eliasen, Djóna í Geilgøta 36, Tórshavn
Tlf 31 96 17 Far 28 26 03
Teldupost: bgls@get2net.dk
bogi_eliasen@hotmail.com
Heimasíða: www.vit.fo/territorial

Hesi hava stuðla tiltakinum: Føroya Landsstýrið, Atlantic Airways, Tórshavnar Býrað, Sam-Teld, Føroya Tele, VIT, Poul Michelsen, Kongshavnar Útgerðarfelag, Tor-Shipping,Vónin, Føroya Banki, JSS-Consult og Advokatgarðurin v/Julionnu Klett

**10 tey fyrstu lesandi, ið melda seg til, fáa goldið atgongumerkið frá Hydro-Saga.**






GÖLZ



Sosialurin - 311820

**Skerimaskinur**
*verða nýttar til:*
- *asfalt og betong*
- *umvæling av vegum*
- *skering í asfalt til útgrevstur*

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralið 22
Tlf./Fax. 314281



Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu

*Nýggir kjólar kunnu útvegast*





## Tað stóra teldukoyrikortið - heysthálvan 2000

| Skema | | | | | 2000 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skeið** | **Nr.** | **Tímar** | **Kl.** | **Kostnaður** | **August** | **September** | **Oktober** | **November** | **December** |
| Windows framhald | S1 | 16 | 13.00-16.45 | 2600 | 21.,23.,28.,30 | | | | |
| Word framhald | S2 | 16 | 13.00-16.45 | 2600 | | 4.,6.,11.,13 | | | |
| Exel framhald | S3 | 16 | 13.00-16.45 | 2600 | | 18.,20.,25.,27 | | | |
| Acces framhald | S4 | 18 | 13.00-17.15 | 3000 | | | 2.,4.,16.,18 | | |
| Dtp og vevsíðugerð | S5 | 16 | 13.00-16.45 | 2600 | | | 23.,25.,30 | 01. | |
| Net og teldusamskifti | S6 | 18 | 13.00-17.15 | 3000 | | | | 6.,8.,13.,15 | |
| KST nýtsla | S7 | 12 | 13.00-16.45 | 1900 | | | | 20.,22.,27 | |

Fyri tey, ið melda seg til øll **sjey skeiðini,** er kostnaðurin **kr. 13.000,00** íroknað undirvísing, skeið, tilfar og matur.

Kostnaður fyri royndir:
Fyri tey, ið hava verið á telduskeiði hjá STH kr. 350,00
Fyri sjálvlesandi kr. 450,00
Kostnaður fyri umroyndir kr. 150,00

# SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH

Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

**Perlan í SMS søkir eftir fólki**
**- at byrja skjótast til ber - vit síknast eftir:**

# KØKS- ella KAFETERIA-ASSISTENTI og LÆRLINGI

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt spennandi starv til tín á einum lívligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir, ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd og klárar at arbeiða undir trýsti. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp.

Íbúð kann møguliga útvegast.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Hans ella Tóru.

Matstovan fyri alla familjuna
Perlan

Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TLF. 315061


**Frá Happadráttinum**

**Seinasti søludagur til 1. drátt er 17. august.** Seðilin spælir við í trimum dráttum

**70% av søluvirðinum verður latið til vinningar**

**HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN**


# Kafeteriahjálp til Perluna í SMS

**Perlan í SMS søkir eftir fólki til ymiskt fyrifallandi arbeiði - at byrja skjótast til ber.**

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt starv til tín á einum lívligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir, ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd og klárar at arbeiða undir trýsti. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp. Møguleiki er eisini at arbeiða niðursetta tíð.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Hans ella Tóru.

Matstovan fyri alla familjuna
Perlan

Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TEL 315061

# Timburmenn til Danmarkar!

Søkt verður eftir timburmonnum til Danmarkar at byrja umleið viku 36.

Áhugaðir kunnu ringja á

**Tlf. +45 21243402** og **+45 21423402**


# Betri svøvn

**BIOflex magnetviðgerð tí:**
- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Sosialurin - 311820

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**
- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNET TERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

